## TILTØK

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 6. mars kl. 19.30, Marita og Egin Henriksen luttaka. Kvinnur og menn eru vælkomin.

**Adventkirkjan**
Alheimsbønardagur fyri kvinnur **verður í Frelsunarherinum** fríggjakvøldið 5. mars kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar at vera við.
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evnið: Veruligur stórleiki, kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti við Martin Thomsen.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Fríggjadagin kl. 19.30 Altjóða kvinnubønardagur.
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møtir, Jens Vilhelm Danielsen talar á báðum møtunum, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Susan Berghamar um evnið: »Náði Guds í lívi Rahabs« og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Øssur Berghamar um evnið: »Frelsan í tátíð, nútíð og framtíð«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Magnus Simonsen, evnið: Friður. Kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikudagin kl. 7 Bønarmøti.

**Samkoman Rhema**
Fríggjakvøldið kl. 20-22 JC Teens.
Leygarmorgunin kl. 10 Mannfólkið hittist, kl. 22 Bønarnátt.
Sunnumorgunin kl. 11 Familjumøti – har okkurt er til alla familjuna.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 12 Sunnudagsskúli. Onki møti verður kl. 12, men kl. 18 verður Familjumøti.
www.hebron.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19.30 Alheimsbønardagur fyri kvinnur í Frelsunarherinum, kl. 20 Ungdómsmøti v/ Meibritt Djurhuus, evnið: Hvussu sær Gud meg?
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Einar Joensen, evnið í ABC: Gud, okkara Faðir. 1. partur v/ Preben Hansen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti við Sam Jakobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdag kl. 20 Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Alheims bønardagur fyri kvinnur í Havn verður í ár hildin í Frelsunarherinum fríggjakvøldið 5. mars kl. 19.30 har allar kvinnur eru vælkomnar og kunnu vera við.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Marcelin Rediu, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Meinigheitshúsið**
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – innsetan av trúboðara, Bergur D. Joensen talar og kórini í húsinum syngja.

**Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night.

**KFUM og KFUK í Havn**
Alheimskvinnubønardagurin verður í Frelsunarherinum kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið Møti v/ Hera Tróndheim.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting v/ Eiler Johannesen.
Opið hús fyri ung verður mánakvøldið kl. 20. Verið hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sjómanskvinnuringurin og DMS hava hugnakvøld í missiónshúsinum mánakvøldið kl. 19.30. Øll eru vælkomin.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Kollafirði. Aftaná verður nátturði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónsvika í Hósvíkar kirkju 4.-7. mars 2004**
Fríggjakvøldið kl. 20 tala og sangur: Jónhilda og Gulak Hansen.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Niels J. Nielsen, Marita, Jóhanna og Halger syngja.
Sunnukvøldið kl. 18 talar Regin Høgnesen. Sangur: Miktam. Øll eru hjartaliga vlkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Paula Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Rasmus og Annu. Trio úr Kollafirði syngur. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Jaspur Langgaard. Evnið: Jesus syndarinna vinur. Lovsangsbólkur syngur. Innsamling til húsið. Aftaná møti verður drekka. Øll eru vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor, kl. 18 Møti við Thaborkórinum.

**Missiónshúsið í Oyndarfirði**
Sunnudagin kl. 17 Møti við John Myllhamar, trúboðara.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 17.
Mánadagin kl. 17.30 TIM 5 og ungdómsmøti kl. 20.

**Skúlin í Funningsfirði**
Missiónsvikan byrjar fríggjadagin 5. mars kl. 20.
Fuglafirðingar tala og Thaborkórið syngur.
Leygardagin 6. mars kl. 20 talar Regin Høgnesen og Streingjakórið á Glyvrum syngur.
Sunnudagin kl. 18 Familjumøti.

**Missiónsvika í Æðuvík**
5.-7. mars við hesum møtum:
Fríggjakvøldið kl. 20 Martin R. Jacobsen
Leygarkvøldið kl. 20 Hans Pauli Højgaard.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta við Martin R. Jacobsen og sunnukvøldið kl. 19 Møti við John Myllhamar.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiði 1.-6. fl., kl. 19 Ungdómsarbeiði 7. fl. og eldri.
Hjartaliga vælkomin.


# Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur verða hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet - ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðing fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.
Her er eitt gott samhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum.
Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum - um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí.
Atlitið til borgaran og samfelagið er alla tíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar



**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum.
Royndartíðin er umleið 3 ár. Aftaná tað fært tú - um tú ert egnaður til politiarbeiði - fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politið hevur eina røð av serskeiðum - og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði - og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

**Føroya Landfúti**
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Postsmoga 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 1448 fax. 35 1449
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 3 politistar skulu setast heystið 2004.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 15.03.2004




## FILMSTEIGURIN

# Men so kom Polly

Tey hava ikki sæð hvønn annan síðani í sjeynda flokki, men hvat tramin – Hví ikki bara bjóða henni út? Tryggingarmaðurin, Reuben, hevði annars lagt lívið soleiðis til rættis, at einki óvæntað skuldi stinga seg upp. Hann og brúðurin, Lisa, skuldu flyta í egin hús, men tá hann á brúðarferðini fann hana saman við einum øðrum, fór tað líka sum í vaskið.

So hví ikki bara bjóða eini fyrrvernadi vinkonu út? Kanska eisini tí Polly er ein heldur flákrandi typa, sum ongantíð er í sama stað í meira enn hálvt ár. Sum altíð skiftir starv og sum ongan tíð heldur leingi saman við nøkrum. At hon so eisini dámar sterkt kryddaðan mat er bara nakað, sum sári magin hjá Reuben hevur ilt við at góðtaka, men tað er ein onnur søga.

Soleiðis er tað ikki so nógv Villa, Volvo og Vovse í Polly, eins og tað heldur ikki er tann stóri ævintýrarin í Reuben, men tikið verður ofta til, mótsetningar hittast, og tryggingin tekur so ikki við av kærleiksávum.

Tað er John Hamburg (Meet the Parenbs og Zoolander), sum hevur skrivað handritið til filmin, sum hann eisini hevur leikstjórnað. I høvuðsleiklutum síggja vit eitt nú, Jennifer Aniston, Philip Seymour Hoffman, Debra Messing, Bryan Brown og Alec Baldwin.







**Undanfrumsýning**
Leygardagin 06.03. kl. 17$^{00}$ Sunnudagin 07.03. kl. 17$^{00}$

**Billettprísur: 35,- kr.**
**4 billettir: 120,- kr.**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 05.03. kl. 19$^{00}$
Fríggjadagin 05.03. kl. 23$^{30}$
Leygardagin 06.03. kl. 21$^{15}$
Sunnudagin 07.03. kl. 19$^{45}$
Fríggjadagin 05.03. kl. 21$^{15}$
Leygardagin 06.03. kl. 19$^{00}$
Leygardagin 06.03. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 07.03. kl. 22$^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 05.03. kl. 23$^{00}$ Leygardagin 06.03. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 07.03. kl. 22$^{30}$




Fríggjadagin 05.03. kl. 20$^{45}$ Leygardagin 06.03. kl. 20$^{45}$
Sunnudagin 07.03. kl. 20$^{15}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 05.03. kl. 17$^{00}$ Leygardagin 06.03. kl. 16$^{30}$
Sunnudagin 07.03. kl. 16$^{15}$




**Billettprísur: 65,- kr.**
Fríggjadagin 05.03. kl. 18$^{15}$ Leygardagin 06.03. kl. 18$^{30}$
Sunnudagin 07.03. kl. 18$^{15}$